Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	27. oktober 2025
Mál nr.:	25/12438-5
Málsviðgjørt:	Terji Beder
Ummælistíð:	Skrivið frá/til
Eftirkannað:	Lógartænastan dagfestir

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Fróðskaparsetur Føroya
(Seturslógin)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 51 frá 9. juni 2008 um Fróðskaparsetur Føroya, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 1. stk. 3 verður strikað.

2. § 2. stk. 1 verður broytt til: "Uppgáva Fróðskaparseturs Føroya er at inna gransking og veita útbúgving sambært § 3. Endamálið er at grunda alla frálæru á gransking og veita útbúgving á hægsta altjóða stigi. Stovnurin skal tryggja samanhang millum gransking og útbúgving og tryggja samfelagsligar raðfestingar og fyrilit í hesum sambandi. Raðfestingarnar av uppgávunum skulu støðugt góðskutryggjast og eftirmetast. Stovnurin skal breiða út kunnleika, luttaka í og eggja til orðaskifti og kvalifisera almenna kjakið."

3. Í § 2, stk. 3, § 3, stk. 3, § 3, stk. 4, § 5, stk. 2, § 9, stk. 1, § 10, stk. 1, § 20, stk. 1 og í § 20 a, stk. 3 verður "Landsstýrismaðurin" broytt til: "Landsstýrisfólkið".

4. Í § 3, stk. 1, § 9, stk. 4, § 10, stk. 2, § 11, stk. 1 og í stk. 4 verður "landsstýrismanninum" broytt til: "landsstýrisfólkinum".

5. § 3. stk. 2 verður broytt til "Fróðskaparsetur Føroya skipar fyri innanhýsis góðskutrygging av útbúgvingunum, sum verða bodnar út á Fróðskaparsetri Føroya, í samsvari við Bologna-ásetingar."

6. § 3. stk. 3 verður broytt til "Landsstýrisfólkið skipar fyri uttanhýsis góðskutrygging av Fróðskaparsetri Føroya. Óheftur

uttanhýsis stovnur ger góðskutryggingina sambært evropeiskum góðskutryggingarleisti."

7. § 4. stk. 1, verður broytt til:
"Fróðskaparsetur Føroya kann bjóða hesar útbúgvingar, har eitt fulltíðar lestrarár samsvarar við 60 ECTS námsstig:

1) Diplomútbúgving, sum er á bachelorstigi, ið telur 60-120 ECTS námsstig.
2) Bachelorútbúgving, sum telur 180 til 240 ECTS námsstig.
3) Masterdiplomútbúgving, sum er á masterstigi, ið telur 60-90 ECTS námsstig
4) Masterútbúgving, sum telur 120 ECTS námsstig.
5) Ph.d.-útbúgving, sum telur 180 ECTS námsstig."

8. § 4. stk. 2, verður broytt til:
"Útbúgvingarnar kunnu verða veittar sum fulltíðar- ella parttíðarlestur."

9. § 4. stk. 3 verður broytt til
"Námsstigini verða løgd til rættis í samsvari við the European Credit Transfer and Accumulation System, ECTS."

10. § 6 stk. 1 verður broytt til:
"Fróðskaparsetur Føroya kann bjóða ískoytisútbúgvingar og eftirútbúgvingar eftir reglum, ið landsstýrisfólkið ásetir eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya."

11. § 6 stk. 2 verður broytt til:
"Fróðskaparsetur Føroya kann bjóða diplomútbúgvingar, ið kunnu vera partar av øðrum góðkendum útbúgvingum á stovninum."

12. § 6 stk. 3 verður lagt afturat:
"Fróðskaparsetur Føroya kann, uttan góðkenning frá landsstýrisfólkinum, bjóða út stakskeið á bachelor- og masterstigi.

13. Í § 11, stk. 5 og í § 12 verður "landsstýrismaðurin" broytt til "landsstýrisfólkið".

14. Í § 21 verður "Landsstýrismanninum" broytt til "Landsstýrisfólkinum".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Lógaruppskotið er sprottið úr ynskinum um at kunna veita hægri útbúgvingar, sum fevna víðari enn núverandi skipan loyvir, og tørvinum á hesum tillagingum, í sambandi við ta menning, sum í løtuni er á pørtum av útbúgvingarøkinum.
Ítøkiliga er hetta sprottið úr einari diplomútbúgving í námsfrøði, sum gevur lesandi fakligar førleikar at virka á tí námsfrøðiliga økinum, hóast talan ikki er um fullar bachelorútbúgvingar. Fyri at kunna veita tann fakliga førleikan, er tørvur á at breiðka um vavið á diplomútbúgvingunum, soleiðis at hesin fakligi førleikin verður tryggjaður.
Samstundis hevur eisini verið arbeitt við einari eftirútbúgvingarskipan fyri fólkaskúlalærarar, og at skipa hesar sum masterdiplomútbúgvingar, sum frameftir verður heitið fyri diplomútbúgvingar á masterstigi.
Hesi ítøkiligu málini eru orsøk til, at hetta uppskotið verður lagt fram í hesum umfari, men broytingarnar, sum fyriliggja í uppskotinum, eru eisini viðkomandi fyri aðrar útbúgvingar, sum vit í framtíðini helst koma at skipa.
Broytingarnar geva okkum møguleikar at skipa útbúgvingar, sum heimild ikki er fyri í dag, og kann yvir tíð geva okkum betri amboð til at skipa útbúgvingar við størri smidleika enn áður, og harvið eisini skapa ein størri samanhang millum ymiskar útbúgvingar.

1.2. Galdandi lóggáva

Galdandi lóggáva er upprunaliga frá 9. juni 2008, men er seinast broytt tann 8. mai 2012. Fróðskaparsetrið bjóðar tær í § 4 nevndu útbúgvingar, sum umframt bachelor, master og ph.d.-útbúgvingar eisini fevnir um diplomútbúgvingar, sum tørvur er á at tillaga.

Ivamál um heimild

Galdandi áseting um diplomútbúgvingar er ógreið, tí hon smbr. § 4, stk. 1, pkt. 3 sigur, at ein diplomútbúgving antin er eitt ársverk á bachelorstøði ella eitt ársverk í framhaldi av bachelorútbúgving. Hóast tað er lætt at skilja, hvat eitt ársverk á bachelorstøði merkir, kann "eitt ársverk í framhaldi av bachelorútbúgving" tulkast upp á tveir mátar. Antin kann ásetingin tulkast sum eitt ársverk á bachelorstigi, har fortreyt fyri upptøku er lokin bachelorútbúgving, ella at talan er um eitt ársverk á masterstigi, sum skipanarliga er eitt framhald av bachelorútbúgving. Sostatt kann henda ásetingin tulkast ymiskt, alt eftir, hvussu hon verður lisin, og tí er tað ógreitt at meta um, hvat fyri slag av útbúgving talan í veruleikanum er um. Lógin nágreinar ikki, hvussu henda ásetingin skal tulkast, og onki er at lesa í viðmerkingunum til lógina, sum gevur ábending um, hvussu henda ásetingin skal tulkast.

Avmarking í ECTS námsstigum

Hóast ásetingin um diplomútbúgvingar er ógreið, hevur hon verið tulkað sum ein heimild at veita diplomútbúgvingar á masterstigi. Hetta hevur verið ein praktisk loysn upp á eina ivasama heimild, sum man tó hevur mett seg at kunna tulka eftir, sjálvt um ásetingin sum sagt er ógreið. Diplomútbúgvingarnar eru tó eisini avmarkaðar til bert at kunna telja 60 ECTS námsstig, og tí ikki kann fevna víðari enn eitt ársverk við fulltíðarlestri.

Ivamál um ymisk hugtøk

Galdandi lóg nýtir eina rúgvu av ymiskum hugtøkum, sum hava við útbúgvingar at gera, og er lógin rættiliga ógreið í sínum hugtøkum. Til dømis nevnir hon fulltíðarútbúgvingar, parttíðarútbúgvingar, eftirútbúgvingar og ískoytisútbúgvingar, umframt vanligu

útbúgvingarnar, sum eru nevndar í § 4 í lógini, sum eru bachelorútbúgvingar, bachelor-útbúgvingar, sum eru yrkisrættaðar, masterútbúgvingar og ph.d.-útbúgvingar. Felags fyri fleiri av hesum heitunum er, at hesi ikki verða nærri lýst í lógini ella í viðmerkingunum til lógina. Hetta ger lógina ógreiða at umsita, og hevur til tíðir skapt ivamál um, hvørjar heimildir í grundini liggja í fleiri av ásetingunum.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur saman við Fróðskaparsetrinum fyrr umrøtt hugtøkini parttíðarútbúgvingar og fulltíðarútbúgvingar. Báðir partar meta, at spurningurin um, hvørs ein útbúgving verður boðin út fulla ella parttíð er ein spurningur, sum snýr seg um, hvussu ein útbúgving verður løgd til rættis, og eiga ikki at verða serstøk hugtøk, sum lýsa sløg av útbúgvingum.

Góðskutrygging
Lógin hevur tvær ásetingar um góðskutrygging. § 3, stk. 2 ásetir, at Fróðskaparsetur Føroya skipar fyri innanhýsis góðskutrygging, men staðfestir ikki, hvussu góðskutryggingin skal fremjast. Tað finnast fleiri hættir at tryggja góðsku uppá, og tí er tað ikki neyðturviliga so, at góðskan verður tryggjað eftir Bologna-leisti.
§ 3, stk. 3 ásetir, at landsstýrisfólkið eftirmetir Setrið. Ein eftirmeting er eitt slag av góðsku, men er ikki tann leisturin, sum man brúkar, tá talan er um hægri útbúgvingar í European Higher Education Area. Orðið *eftirmeting* er tað, sum á enskum kallast *evaluation*, og er tí ikki talan um *góðskutrygging*, sum á enskum kallast *quality assurance*.
Mett verður, at Fróðskaparsetur Føroya eigur at verða góðskutryggjað eftir tí leisti, sum er lagdur fyri Bolognatilgongdina, og at lógin eigur at endurspegla hetta, bæði innanhýsis við § 3, stk. 2 og uttanhýsis við § 3, stk. 3.

Søgulig áseting
Lógin innheldur eina áseting, sum staðfestir samanleggingina av Fróðskaparsetri Føroya, Føroya Læraraskúla og Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, sum fór fram við upprunaligu lógini frá 2008. Ásetingin staðfestir eina bygnaðarliga broyting, sum hendi tá, men sum ikki ber til at umsita eftir, og tí ikki longur hevur nakran lógarmessigan týdning, og tí eigur at verða strikað úr lógini.

Siðvenja um stakskeið
Fróðskaparsetur Føroya hevur við siðvenju kunnað veitt út stakskeið, uttan at landsstýrisfólkið hevur góðkent sjálvi skeiðini. Henda siðvenjan er við til at skapa ein smidleika í útbúgvingarskipanina, og hevur tí ofta verið til stórt gagn, tá ið nýggjar útbúgvingar hava verið mentar. Siðvenjan er tó, sum sagt, ein siðvenja, og ikki nakað, sum er sett í lógina.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at fáa heimild til at veita fleiri ymiskar útbúgvingar, sum ikki eru fastlæstar til tær ECTS-ásetingar, sum í dag eru galdandi. Hetta fyri at skapa størri smidleika í tað føroyska útbúgvingarverkið, við betri møguleika at skapa útbúgvingarleiðir, ið stuðla upp undir lívlanga læru o.l., og at fyriskipa eftirútbúgvingar og styttri útbúgvingar á bachelorstigi, sum geva førleika at virka á einum starvsøki.

Orsøkin til dagføringarnar av lógini eru í fyrstu atløgu sprotnar í tørvinum á at kunna veita 60 ECTS útbúgvingar á masterstigi, sum eftirútbúgvingarskipanin leggur upp til, sum NÁM og Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya skipa fyri. Eisini eru dagføringarnar sprotnar úr tørvinum at kunna veita námsfrøðiliga diplomútbúgving á 120 ECTS námsstig, sum fult og heilt kann góðskrivast inn á tí fullu bachelorútbúgvingina í Námsfrøði.

Galdandi lóg hevur eina áseting, sum tykist at hava havt til endamál at kunna veita útbúgvingar, sum heilt ella lutvíst kunnu góðskrivast inn á heila bachelor- ella masterútbúgvingar. Talan er um § 6, stk. 2, sum brúkar hugtøk sum parttíðarútbúgvingar og fulltíðarútbúgivngar. Men av tí at ásetingin er ógreið í síni orðing, er heimildin ikki blivin brúkt. Henda heimildin verður umorðað, so hon hóskar seg diplomútbúgvingunum, og at heimildin sostatt verður greið, og møguleiki verður at fáa hesa áseting at virka eftir sínum endamáli.

Endamálið við uppskotinum er eisini at gera ymiskar tillagingar, sum gera lógina greiðari. Tað veðrur gjørt við at strika nøkur av teimum hugtøkunum, sum eru í lógini í dag, har ymisk sløg av útbúgvingum verða nevnd, sum tó ikki eru allýst í lógini. Her verður farið frá hugtøkunum fulltíðarútbúgving og parttíðarútbúgving, og í staðin verður ásett, at útbúgvingar kunnu skipast fulla tíð ella parttíð.

Við dagføringini eru eisini smávegis málsligar broytingar, sum ikki hava innihaldsligan týdning fyri, hvussu lógin verður umsitin. Harafturat verða treytirnar fyri góðskutrygging gjørdar neyvari, soleiðis at góðskutrygging sambært lógini kemur nærri Bolognatilgongdini.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Við uppskotinum verður § 4, stk. 1, pkt. 3 býtt í tveir partar, ávikavist diplomútbúgving á bachelorstigi á 60 – 120 ECTS námsstig og diplomútbúgving á masterstigi á 60 – 90 ECTS námsstig. Munur verður gjørdur á diplomútbúgvingunum við at kalla diplomútbúgvingina á bachelorstigi fyri diplomútbúgving, meðan diplomútbúgvingin á masterstigi verður nevnd masterdiplom. Við hesi broyting verða diplomútbúgvingarnar neyvari lýstar, tær fáa hvør sítt heiti og vavið av útbúgvingunum verður breiðkað í mun til galdandi lóg, sum gevur betri møguleikar at skipa fyri hægri útbúgvingum, sum ikki eru vanligar bachelor-, master- ella ph.d.-útbúgvingar.

Við broytingunum í diplomútbúgvingunum verður møguligt at skipa fyri diplomútbúgvingum, sum kunnu innganga í fullar bachelorútbúgvingar, samstundis sum útbúgvingarnar kunnu geva førleika at virka á einum starvsøki. Á tann hátt kunnu hesar útbúgvingar skiljast sum ávegisútbúgvingar, í mun til tí ordineru útbúgvingarskipanina, samstundis sum tær geva førleika at virka á einum starvsøki. Hesar tillagingar verða mettar at kunna skapa útbúgvingar, sum kunnu røkka málbólkum, sum ikki hava umstøður at taka eina fulla bachelorútbúgving, og møguleiki verður tí hjá fleiri at nema sær hægri útbúgving. Tey, sum taka hesar útbúgvingar hava tá góðar møguleikar at lesa víðari, um hesi undir lestrinum ella seinni fáa hug ella finna áræði at taka eina fulla bachelorútbúgving.

Við diplomútbúgvingunum á masterstigi ber til at skipa fyri eftirútbúgvingum á masterstigi, sum tó ikki eru fullar masterútbúgvingar. Henda skipanin er tað, sum í summum londum verður nevnt “further education” og gevur góðar møguleikar at skapa aðrar útbúgvingar á masterstigi, sum eisini kunnu eggja til meiri vinnurættaðar útbúgvingar.

Ein fyrimunur við diplomútbúgvingunum, bæði á bachelor- og á masterstigi er, at man í upptøkukrøvum lættari kann skipa upptøku, sum víkir frá teimum vanligu upptøkutreytunum fyri bachelor- og masterútbúgvingar. Hetta verður tó ikki møguligt við bert at gera hesa lógarbroytingina, men krevur broytingar í upptøkukunngerðini. Lógin ger tað tó lættari at skyna ímillum ymiskar útbúgvingar, og harvið kann upptøkan í upptøkukunngerðini eisini lættari tillagast, um ynski skuldi verið til tess.

Tað finnast nógvir mátar at tosa um góðskutrygging, og ymiskar tilgongdir finnast fyri ymiskar útbúgvingar og útbúgvingarstig. Við tillagingunum av innanhýsis góðskutryggingini sambært § 3, stk. 2, verður víst beinleiðis til Bolognatilgongdina, sum sostatt verður grundarlagið fyri tí innanhýsis góðskutryggingini.
Eins og við tí innanhýsis góðskutryggingini verður uttanhýsis góðskutryggingin sambært § 3, stk. 3 eisini ført sambært Bologna-krøvum. Tann orðingin er tó orðað eitt sindur linari, fyri ikki at binda henda partin til eina ov stranga fatan av góðskutryggingarleistinum. Tað verður tó víst til Bolognatilgongdina í teimum serligu viðmerkingunum til greinina, og tí verður uttanhýsis góðskutryggingin eisini heft nærri Bolognatilgongdini. Orsøkin til hesa meira varnu tilvísingina er møguleikin at nýta góðskutryggingarstovnar, sum enn ikki hava eina sokallaða ENQA-góðkenning, sum kann verða neyðugt, um vit skulu hava eina góðskutryggingarskipan, sum hóskar seg føroyskum viðurskiftum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Hesi hava havt lógaruppskotið til ummælis:

- Uttanríkis- og vinnumálaráðið
- Fíggjarmálaráðið
- Almanna- og mentamálaráðið
- Heilsumálaráðið
- Fiskuvinnu- og samferðslumálaráðið
- Umhvørvismálaráðið
- Løgmálaráðið
- Fróðskaparsetur Føroya
- Undirvísingarstýrið
- Studni
- Yrkisdepilin
- NÁM
- Meginfelag Føroyskra Studenta
- Ráð Teirra Lesandi
- Vinnuhúsið
- Kommunufelagið
- Akademikarafelag Føroya
- Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
- Starvsfelagið
- Føroya Lærarafelag
- Føroya Pedagogfelag
- Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Við nýggjum sløgum av útbúgvingum kann lógaruppskotið elva til broytingar í sáttmálasamráðingum yvir tíð. Hetta kemst av teirri orsøk, at tá nýggjar útbúgvingar verða veittar fyri eitt øki, sum í dag ikki er fevnt av lønarsáttmálunum, so uppstendur ein tørvur at flokka hesar útbúgvingarnar eftir einum sáttmála og einum lønarstiga. Til dømis kann nevnast, at ynski um eina nýggja diplomútbúgving í námsfrøði verður gjørlig, og at sáttmálin millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið ikki hevur eina lønarflokking fyri hetta slagið av útbúgvingum. Á sama hátt kann hugsast, at tørvir eisini kunnu íkoma fyri aðrar sáttmálar. Summir sáttmálar loyva samsýningum, sum eru knýttar at ECTS-námsstigum, meðan aðrir brúka ECTS-námsstig til flokking av starvsfólkum. Hetta kann eisini hava við sær ávísar broytingar, hóast hesar enn eru ókendar, men verða tá partur av sáttmálasamráðingunum millum partarnar.
Ongar aðrar fíggjarligar avleiðingar eru av uppskotinum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur. Uppskotið hevur tó umsitingarligar avleiðingar fyri Fróðskaparsetur Føroya, sum við uppskotinum kemur at skipa útbúgvingarnar eitt sindur annarleiðis enn verandi lóg loyvir.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar ella umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna. Møguleiki verður tó at skipa fyri diplomútbúgvingum, sum eru størri í vavi enn hvat galdandi lóg heimilar. Útbúgvingar av hesum slagi kunnu eisini verða rættaðar móti vinnuni.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir, tó so at lesandi kunnu fáa møguleika at taka nýggjar útbúgvingar.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið tilskrivar, at innanhýsis góðskutrygging verður ført eftir *European Standards and Guidelines* (ESG), sum eru aðalreglurnar, sum eru galdandi fyri góðskutrygging sambært Bolognatilgongdini. Somuleiðis verður víst á, at uttanhýsis góðskutrygging eisini verður ført

eftir líknandi leisti, sum eisini vísir til Bolognatilgongdina. Á tann hátt verður tað lógarásett, at góðskutrygging á Fróðskaparsetri Føroya er í samsvari við Bolognatilgongdina.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið viðvíkur ikki Hoyvíkssáttmálanum, Evropeiska mannarættindasáttmálanum ella ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið viðførir ongar markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella aðrar ásetingar, sum gera størri inntriv í rættindi hjá fólki.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið viðførir ongar beinleiðis ella óbeinleiðis skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið viðførir ongi beinleiðis gjøld. Fróðskaparsetur Føroya kann tó veita stakskeið og útbúgvingar eftir gjøldum, og kann tað hugsandi eisini galda fyri útbúgvingarnar, sum hetta lógaruppskotið fevnir um. Uppskotið viðførir tó ongi gjøld í sær sjálvum.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógaruppskotið gevur ikki Fróðskaparsetri Føroya nakra nýggja heimild sum so, tó so at tað við uppskotinum framgongur greiðari, at Fróðskaparsetur Føroya kann bjóða út diplomútbúgvingar á masterstigi (masterdiplom).
Lógaruppskotið gevur ikki landsstýrisfólkinum, kommunum ella stovnum undir landsstýrinum fleiri heimildir.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Sum fylgja av uppskotinum skal útbúgvingarkunngerðin tillagast, soleiðis at hon er í samsvari við § 4 stk. 1 í lógini. Broytingin fevnir tí einans um § 1, stk. 3 í kunngerðini.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Nr. 1: Mett verður ikki, at neyðugt er at varðveita ásetingina um, hvørjir útbúgvingarstovnar løgdu saman við Fróðskaparsetri Føroya í 2008. Ásetingin er søgulig, gevur onki slag av heimild, og ikki ber til at umsita eftir henni. At strika ásetingina hevur tí heldur onga løgfrøðiliga avleiðing.

Nr. 2: Meðan Fróðskaparsetur Føroya í sínum endamáli varðveitir skylduna um at luttaka í og at eggja til samfelagsligt kjak, verður farið frá kravinum um at breiða út vitan um vísindalig háttaløg. Orsøkin er tann, at tað ikki verður mett, at kunnleiki í vísindaligum háttaløgum er nóg týdningarmikil fyri almenningin, at hetta skal fevnast av endamálinum hjá Fróðskaparsetrinum. Afturat verandi orðingum verður lagt afturat, at Fróðskaparsetur Føroya skal kvalifisera tað almenna kjakið.
Harafturat verður ásett, at Setrið skal tryggja samanhang millum útbúgving og gransking, og at raðfestingar, sum Setrið ger, skulu eftirmetast og góðskutryggjast.

Nr. 3: Málsligar dagføringar.

Nr. 4: Málsligar dagføringar.

Nr. 5: Nýggja ásetingin er ein tillaging av verandi áseting, sum ger kravið um innanhýsis góðskutrygging greiðari við at áseta, at innanhýsis góðskutryggingin verður førd sambært ásetingum í Bolognatilgongdini. Tað vil siga, at talan er um góðskutrygging sambært *The Standards and guidelines for quality assurance in the European Higher Education Area*, vanliga nevnt *European Standards and Guidelines* (ESG). Tað finnast ymiskir mátar at tryggja góðsku upp á í útbúgvingarheiminum, og við hesi áseting verður gjørt greitt, hvør leistur tað er, sum verður lagdur fyri innanhýsis góðskutryggingina á Fróðskaparsetri Føroya.

Nr. 6: Farið verður frá hugtakinum *eftirmeting* til hugtakið *góðskutrygging*. Orsøkin er tann, at orðið *eftirmeting* er føroyska orðið fyri tað, sum á enskum nevnist *evaluation*, meðan *góðskutrygging* er føroyska orðið fyri *quality assurance*. Góðskutrygging er eitt neyvari hugtak fyri ta eftirlit, sum aðalráðið hevur við góðskuni á stovninum, og verður hetta framhaldandi gjørt av uttanhýsis serfrøði, sum tó verður nágreinað til ein uttanhýsis góðskutryggingarstovn, ið arbeiðir eftir evropeiskum leisti. Sum útgangsstøði er talan tá um góðskutrygging sambært ESG.

Nr. 7: Diplomútbúgvingarnar verða við hesari ásetingini býttar í tvær. Ein á bachelorstigi og ein á masterstigi. Við hesi broytingini er tað púra greitt, hvør heimildin er, har tann gamla orðingin var ógreið, og kundi elva til ymiska tulking av útbúgvingini sjálvari. Við at býta diplomútbúgvingarnar sundur, verður greitt, at talan er um diplomútbúgving á bachelorstigi á 60-120 ECTS námsstig ella diplomútbúgving á masterstigi á 60-90 ECTS námsstig.
Bachelorútbúgvingarnar verða lagdar í eitt spenni frá 180 ECTS námsstig til 240 ECTS námsstig. Hetta fyri at viðurkenna, at talan er um fullar bachelorútbúgvingar, óansæð um talan er um eina akademiska bachelorútbúgving ella eina yrkisrættaða bachelorútbúgving.
Masterútbúgvingar og ph.d.-útbúgvingar eru óbroyttar.

Útbúgvingarsløgini verða reksaði upp eftir tí stigi, sum talan er um. Fyrst er tað fyrra diplomútbúgvingin, sum er ein útbúgving, sum er á bachelorstigi, men sum tó ikki er ein full bachelorútbúgving. Síðan er tað bachelorútbúgvingar, bæði vanligar og yrkisrættaðar, síðan tann seinna diplomútbúgvingin, sum verður veitt á masterstigi, men sum tó ikki er ein full masterútbúgving. Harnæst kemur masterútbúgvingin og síðan ph.d.-útbúgvingin.

Nr. 8: § 4, stk. 2 ásetir, at útbúgvingar kunnu verða veittar sum fulltíðar- ella parttíðarlestur. Við ásetingini verður sostatt farið frá hugtøkunum fulltíðarútbúgving og parttíðarútbúgving. Spurningurin hvørs ein útbúgving verður veitt fulla ella parttíð er ein skipanarligur spurningur, sum ikki hevur við innihaldið á útbúgvingini at gera.

Nr. 9: Áleggur Fróðskaparsetrinum at skipa ECTS-námsstigini eftir European Credit and Accumulation Transfer System, ECTS, sum er standardurin, sum er galdandi fyri tær útbúgvingar, sum verða veittar sambært Bolognatilgongdini.

Nr. 10: Sum fylgja av broytingini í punkt 8, verður orðið parttíðarútbúgvingar strikað.

Nr. 11: Ásetingin gevur Setrinum heimild at skipa diplomútbúgvingar, sum kunnu innganga sum partur av aðrari bachelor- ella masterútbúgving.

Nr. 12: Sambært gamlari siðvenju kann Fróðskaparsetur Føroya veita út stakskeið uttan góðkenning frá landsstýrisfólkinum. Við hesi áseting verður henda siðvenjan staðfest í lóg.

Nr. 13: Málsligar dagføringar.

Nr. 14: Málsligar dagføringar.

Til § 2
Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 24. november 2025

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2:
Fylgiskjal 3: